sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Einkur Lindenskov

Blaðfólk: Dagny Joensen, Aki Bertholdsen, Emil L. Jacobsen, Sveinur Tróndarson, Turið Kjølbro

Ljósmyndari: Jens Kristian Vang
Lýsingar og søla: Jonhard Hammer

Útgevari, uppseting og prent: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argjum
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn

Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo

Djúpvatnstrolararnir mugu ikki sleppast upp á fjall

Oddagrein

FYRI fleiri árum síðani boðaði tásitandi landsstýri frá, at allir studningur til fiskivinnuna skuldi falla burtur, og í ár fall so seinasti íløgustuðulin burtur.

Við øðrum orðum er tað ikki komið óvart á nakran, at flotin skuldi klára seg uttan íløgustuðul. Allir politisku flokkarnir eru helst eisini samdir um, at vinnan skal klára seg uttan beinleiðis ella óbeinleiðis rakstrarstudning. Øðrvísi er við stuðli at stovna vinnuvirki, viðvíkjandi stuðli til marknaðarkanningar og onnur vinnulig framtøk.

Kortini kom tað óvart á tey flestu, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum heldur fast um ikki at lata djúpvatnstrolararnar fáa íløgustuðul samhaldandi.

Teir tólv djúpvatnstrolararnir hava ikki fingið lut í økta toskafiskiskapinum, sum hevur bjargað øðrum pørtum av flotanum. Harafturat hava teir verið fyri skerjingum. Fyrst undir Íslandi, síðani eystanfyri og at enda undir Føroyum, har royndin er avmarka eftir blálongu, tí á hesum leiðum royna garnabátar.

Tí eru djúpvatnstrolararnir í eini serstøðu. Og teir eru eisini í tí serstøðu at teir so at siga bara eru knýttir at Vágum og Suðuroynni.

Nú er ikki vist, at teir fara av knóranum, um teir ikki fáa íløgustuðul aftur, men fara teir av knóranum, kann hetta fáa álvarsligar avleiðingar fyri hesi øki, sum frammanundan eru hart rakt av búskaparkreppuni.

Í síni tíð vóru djúpvatnstrolararnir ein nýskapan og lætti um trýstið á aðrar fiskastovnar. Tí hava teir aðra lagnu uppiborna, og mælt verður tí til annaðhvørt íløgustuðul ella aðra kompensatión í eini skiftistíð í nøkur fá ár, tí hesir trolarar geva eitt lutfalsligt stórt íkast til bæði lokalsamfeløgini og føroyska samfelagið sum heild.

Sosialurin

Politiskt frælsi og síðani sjálvbjargni er skeiv raðfylgja

Stutt eftir valið var greitt, at sitandi samgonga var veruleiki. Hóast hesir tríggir flokkarnir: fólkaflokkurin, tjóðveldið og sjálvstýrisflokkurin høvdu boðað frá undan valinum, at tað var fult sjálvstýri teir miðaðu ímót, so var tað paradoksalt nokk Edmund Joensen, ið legði støði undir hesa samgonguna við at skjóta Annfinn Kallsberg upp sum løgmansevni og samráðingarleiðara. Hvussu Edmund Joensen sjálvur hevur tað við hesum er ógreitt, men hetta var so ein herskin biti fyri teir veljarar, ið sóu sambandsflokkin sum ein garant fyri ríkisfelagsskapin.

Fyri mær sæt út sum eitt ógvuliga greitt trýbýti er gjørt samgonguflokkana millum: Sjálvstýrisflokkurin fekk eina yvirumboðan í landsstýrinum, ið als ikki stendur mát við nakrar proportiónir.

Tjóðveldisflokkurin fekk sjálvstýrismál, meðan fólkaflokkurin eigur tann dagliga politikkin.

So í fólkaflokkinum sita taktikarar.

Meðan sjálvstýrisflokkurin gleðist yvir ein eyka landsstýrismann og tjóðveldisflokkurin putlast við loysingina, førir fólkaflokkurin hvønn dag praktiskan borgarligan politikk. Men taktisk evnir eru ikki nakar ringur eginleiki í politikki.

Sum søgan sigur frá, so hava vit verið í ríkisfelagsskapi við onnur lond óslitið í 1000 ár. Frá umleið ár 1000 til 1380 í felagsskapi við Noreg. Eftir hetta og fram til 1814 í ríkisfelagsskapi við Noreg - Danmark. Eftir Kielerfriðin 1814 hava vit verið í ríkisfelagsskapi við Danmark.

Men tað verður valla bara søgan sum kemur veljaranum í hug, tá ið atkvøðast skal um loysingina.

Hvussu sær gerandisdagurin út eftir loysingina? Hvussu trygg er framtíðin hjá okkara børnum eftir loysingina? Hetta eru relevantir spurningar, ið veljarnir hevur krav uppá at fáa svaraðar. Onkur signal eru longu komin. T.d. segði Óli Breckmann undir viðgerðini, at hvørki danska ella føroyska samfelagið hevur ráð til verandi vælferðarskipan. Hetta er erlig tala frá einum borgarligum politikara, í hvørs hendur fólkið skal leggja sína framtíð.

Eitt annað signal um okkara framtíð er tann fráboðaða fólkatryggingin, sum mótsatt samhaldsfasta skal tryggja stættarmunin heilt upp í ellisár.

Javnaðarflokkurin hevur seinstu mongu árini havt sum stevnumið at seta í gildi eina sjálvstýrislóg, soleiðis at vit so hvørt vit vera sjálvbjargin taka ræði á øllum málsøkjum. Eftir okkara tykki má og skal politisk frælsi og búskaparligt frælsi fylgjast. Hetta er eisini ein spurningur um moral.

Tá ið vit spyrja, hvussu ein fíggjarlóg sær út uttan blokkin og tá ið vit spyrja um, hvussu vit skulu fíggja almannamál, heilsumál og skúlamál, fáa vit at vita, at hetta eru ræðumyndir, ið ikki krevja svar. Og í løgmansrøðuni síggja vit, hvussu samgongan prioriterar. Fyrireikingarnar til loysing eru feldar í fimm punktir:

Tær fíggjarligu og búskaparligu fram**rokningarnar** eru nevndar síðst í raðfestingini. Hesar áttu eftir javnaðarmetum at staðið fremst.

Fyri líkasum at **kyrra** andstøðu og veljaran verður fullveldisætlanin samanborin við íslendsku loysingina. Men Ísland 1918 og Føroyar 1998 kunnu als ikki samanberast. Fyri tað fyrsta var Ísland ikki umfatað av tí donsku grundlógini fyri tað næsta hevði Ísland onga uttanlandaskuld og fyri tað tríðja fekk - eftir hvat eg havi fingið upplýst - Ísland 60.000 kr. árliga í ríkisstuðli móti okkara milliard.

Út ímóti 80% av Føroya fólki vilja broytingar í ta ríkisrættarligu støðuna. Tí er sjálvstýrislógin hjá javnaðarflokkinum ongantíð meira aktuelt enn júst nú. Hinvegin eru einans nøkur og 20% ið ynskja loysingina. Tí eru tað sterkar kreftir ið samgongan stendur upp ímóti. Hetta veit samgongan og tí skulu pengar setast av til politiska upplýsing. Tey isavomu skulu yvirtalast.

Her fari eg at spyrja um andstøðan fær sín lut av hesum pengum.

Annars er talan um politiska indoktrinering, og tað kunnu vit ikki liva við.

Sambært løgmansrøðuna so skulu fullveldisætlanirnar til aðalorðaskifti í tinginum í nærmastu framtíð. Fólkið vil broytingar og Javnaðarflokkurin vil broytingar.

Samgongan má gera sær greitt, at skal verunligt orðaskifti spyrjast burturúr, so megu tøl og fakta á borðið.

Javnaðarflokkurin vil í fullum álvara viðgera hesar spurningar, men vit hava boðað frá at sjálvstýrisætlanin undir ongum umstøðum skal kosta fólksins vælferð. Og broytingar í ríkisrættarligu støðuna, sum javnaðarflokkurin ikki fær sjónliga ávirkan á, fara vit als ikki at taka undir við. Viðgerðin higartil hevur ikki verið tekin um semju í loysingarspurningum.

T.d. hava verið langt millum sjónarmiðini hjá Bjarna Djurholm og Høgna Hoydal og ímillum sjónarmiðini hjá Helenu á Neystabø og Heina O. Heinesen.

Hóast løgmansrøðan var hólig og hóast bara 4 mál higartil eru løgd fyri tingið í tí nýggju setuni, so eru longu tekin um, at vit fáa eitt baldrugt samgonguskeið, tí tað tykist hvørki at vera semja um fullveldistankan ella fiskivinnupolitikkin.

Harra formaður!

Eitt tað fyrsta, henda sjálvstýrissamgonga tryggjaði sær frá dønum, var, at blokkstuðulin skuldi halda óbroyttur fram valskeiðið út, og hetta er jú ikki tekin um, at teir fyribils ætla at skapa eitt sjálvberandi samfelag. Men livst so spyrst.

Dan R. Petersen